# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingur til Bráðdeildina G1 (Rætting)

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi á starvsbrøki 0,5 til setan 1. apríl til og við 30. september 2009 og ikki til og við 30. desember 2009, sum av misgávum áður varð lýst.

Bráðdeildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina

Tú kemur, í mun til, tørv og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur innan tað intensiva økið.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- evni til skjótt at skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar inna serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500, lokal 5811 til Jórun Højgaard, deildarleiðara, lsjorho@ls.fo ella til Hergerð Heldarskarð, virkandi leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Brádeplinum, lokal 5701, lsherhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 23. februar 2009 kl. 12.00**

## Læknaskrivari til Psykiatriska depilin

Vegna støðugt vaksandi virksemi er eitt fulltíðarstarv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. apríl 2009 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- tænastuhugað/ur
- góð samstarvsevni
- góðan røkjuskap
- góðan kt-førleika
- blíð/ur og fyrikomandi
- tolir broytingar

**Vit kunnu bjóða:**
- fjølbroytt starv í lítlum skrivaratoymi
- góðar starvsfelagar og gott tvørfakligt samstarv í og millum toymi
- eitt gott og dynamiskt arbeiðsumhvørvi, har nógvar avbjóðingar standa fyri framman
- møguleikar fyri førleikamenning og dygdarmenning

Nærri fæst at vita um starvið frá Tormóði Stórá, leiðandi yvirlækna, tlf. 304500, lokal 4100, t-post: lstost@ls.fo ella til Jórun Arge, leiðsluskrivara, lokal 4103, t-post: lsjorar@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 27. februar 2009 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til G3**
Umsóknarfreistin er 16. feb. 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar B8**
Umsóknarfreistin er 16. feb. 2009 kl. 12.00

**Starvsfólk til Sjúkraflutningstænastuna**
Umsóknarfreistin er 20. feb. 2009 kl. 12.00

**Bioanalytikarar**
Umsóknarfreistin er 20. feb. 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/ pleygari til psyk. D1**
Umsóknarfreistin er 20. feb. 2009 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B7**
Umsóknarfreistin er 23. feb. 2009 kl. 12.00

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 5. mars 2009

**Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna**
Umsóknarfreistin er 24. mars 2009

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn
ella við telduposti til umsokn@ls.fo







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo




Altíð tað nýggjasta
www.sosialurin.fo